## DAGSINS MEINING

# Høgrasnaring

Sosialurin og Útvarpið kunngera nú fyrstu veljarakanningina eftir at valið var útskrivað. Gallup hevur gjørt hana. Lat tað vera sagt, at veljarakanningar eru góðar, tá røðast skal um tær stóru linjurnar í undirtøkuni hjá politisku flokkunum. Tó skal fyrivarni takast, tá t.d. talan er um hvørjumegin sperrumarkið ein lítil flokkur er, tí tá eru marginalarnir so smáir, at ein veljarakanning hevur sera avmarkað virði.

Viðvíkjandi teimum smáu flokkunum, er tað ikki óvæntað, at Sjálvstýrisflokkurin stendur til at varðveita sín eina tinglim. Fólk hava fyrr spátt um deyða Sjálvstýrisfloksins, men hava ikki fingið rætt enn, og ivasamt er, um tey fáa rætt hesuferð. Miðflokkurin, stendur til eina framgongd. Ikki er hetta so løgið, tá hugsað verður um, hvussu hesin flokkur er sloppin at seta dagsskránna í júst slitnu samgongu.

Samgongan hevur mist sín meiriluta í fólkinum sambært veljarakanningini. Hetta kløkkar neyvan nakran, tá hugsað verður um avrikini í brátt farna valskeiði. Tað, ið kann bítast merki í, er, at serliga Tjóðveldisflokkurin stendur til at missa. Hetta er kanska ikki so løgið, tá hugsað verður um, hvussu tjóðskaparmálið bert gjørdist til eitt mál um at yvirtaka undir Heimastýrislógini. Heldur ikki kann tað undra nakran, at ein flokkur missir, ið hevur staðið á odda fyri einari raðfesting, ið hevur merkt, at almenni raksturin er dýrkaður sum ongantíð fyrr, samstundis, sum man hevur spart í heimahjálp til tey gomlu. Hetta verður sjálvandi straffað av veljarnum. Tey gomlu hava betur uppiborið enn at sita í óvaskaðum húsum part av árinum, tí at ein samgonga ikki dugir at raðfesta.

Tað kann kanska undra, at Fólkaflokkurin heldur stand, sæð út frá avdúkingunum um Anfinn Kallsberg. Hetta sigur okkum helst nakað um Fólkaflokkin og veljarar hans. Vit kunnu nevna hvussu fyrrverandi Fólkafloksformaðurin Thorstein Petersen sáli var gjørdur til martyr av Fólkafloksveljarum, tá hann misti valbarið eftir dóm í samband við Sjóvinnubankafallitið í fimmtiárunum.

Í andstøðuni stendur Sambandsflokkurin til framgongd, meðan Javnaðarflokkurin stendur í stað við sama tingmannatali. At Sambandsflokkurin gongur fram merkir tó ikki, at polariseringin millum loysing samband er líka sterk, sum hon var í tveimum teimum undanfarnu valunum. At Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin halda stand, meðan Tjóðveldisflokkurin viknar og teir smáu flokkarnir samanlagt vinna fram, kann merkja, at veljarin til komandi val fer at hugsa meir um annað, enn um tjóðskaparspurningin, ið hevur verið altdominerandi seinastu fimm árini.

Í ljósinum av hesum er orsøk til at rópa varskó. Um veljarakanningin er eftirfarandi, so er talan um eina høgrasnaring, ið kann koma føroyska samfelagnum aftur um brekku. Betur verður støðan heldur ikki, tá nú partar av Tjóðveldisflokkinum hálsfevnast við einari "lat standa til" liberalismu, ið helst ikki er sæð nakrastaðni í framkomna heiminum síðani fimmtiárini. Tað er at vóna, at valstríðið og búskaparligi veruleikin fær fólk at vakna og innsíggja, at vælferðarsamfelagið og arbeiði til allar hendur ikki er nøkur sjálvfylgja. Hetta krevur rætta politiska raðfesting, og tað hevur høgrivongurin ikki at bjóða.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fullveldis-samgongan kollsigld!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Javnaðarflokkurin er klárur – fólkið skal setast fremst!

Síðani 1998 hevur Føroya land verið stýrt av eini fullveldissamgongu.

Hóast flestu føroyingar leingi hava sæð, at endin var nær, so hava nakrir lærhvølpar roynt til tað seinasta at varta upp í fjølmiðlunum við sínum óbúna naiviteti og óvitan. Men lítið hjálpti, tí veruleikin kann ikki krógvast í allar ævir.

Í dag vita vit, at nærum allur tann politikkur, sum hevur verið trúttaður niður í okkum síðan 1998 og til nú, hann bar ikki. Hettar hava vit onnur roynt at siga samgonguflokkunum frá, men teir vildu ikki lurta. Nú eru teir við at eta hvønn annan.

Javnaðarflokkurin segði greitt frá, at vit komu ikki longur fram á sjálvbjargnis- og sjálvstýrisleið við at:

1) Fara til Danmarkar at sláa nevan í borðið og bresta við hurðunum – vit bert eyðmýktu okkum sjálvi.
2) Fara til ST í New York at forklaga – vit vóru vendir í hurðini.
3) Halda fólkaatkvøður um grundlóg og loysing uttan ein stóran meiriluta av veljarunum aftan fyri seg.
4) At minka blokkin úr Danmark við risafetum – tað skaðir okkara vælferð, og tað vil fólkið ikki.

Nei, bert ein gongd leið er framá við meira sjálvstýri, og tað er tann leiðin, sum Javnaðrflokkurin hevur gingið og er til reiðar at ganga, tó bert við so nógvari ferð, at tað ikki nervar okkara búskap og harvið vælferð Føroya fólk.

Men fullveldisflokkarnir vildu ikki lurta. Teir sigldu á eitt sker fyri og annað eftir, og nú er fullveldisskútan – sambært Jógvan Mørkøre – kollsigld og sokkin.

Fyrsta sjálvstýris-landsstýrið yvirtók jólaheilsanirnar. Tað næsta sendi 367 milliónir krónir árliga retur til Danmark. Og nú fingu teir ikki fíggjarløgtingslógina at hanga saman, rýmdi tí í ótíð, sjálvt um vit hava havt tey sjey feitu árini búskaparliga. Slíkt eru garpar?

Nú má tað vera gingið upp fyri føroya fólki, at okkum tørvar ein annan politikk, eitt annað landsstýri, eina aðra samgongu á løgtingi, helst við Javnaðarflokkinum á odda.

Fullveldisfestin er av, tey rýmdu frá uppvaskinum. Men Javnaðarflokkurin er klárur at taka yvir. Tí verður biðið um fólksins stuðul tann 20. januar 2004.

# Einmansherurin Immi

**Tórbjørn Jacobsen**



Immi Dam legði harðliga frá landi nú val til Føroya løgting varð útskrivað. Sum ein einmansherur sveiggjar hann slíðraspjótið, og tað man kennast mongum undarligt, at tað serliga eru tjóðveldismenn, ið skula stingast niður hiðani og fram til 20. januar.

Fyrsta blóðoffurið var Høgni Hoydal. Immi legði hann undir at taka undir við fríari fosturtøku. Eitt høgg í blindum og av órøttum, tá ið formaður Tjóðveldisfloksins meiri enn einaferð alment hevur boðað frá, at hann als ikki tekur undir við fríari fosturtøku. Leygardagin royndi maðurin at sníkja seg burturúr ósannindunum aftur. Ikki við at bakka. Ein nýggjur offensivur verður royndur. Alternativa blóðoffurið er undirritaði.

Tað er bara Immi Dam, sum avger, hvørjum hann atkvøður fyri á valinum og á valum frameftir. Hevur hann einaferð latið mær sína atkvøðu takki eg honum fyri tað. Men harfyri farið eg ikki at finna meg í at hann leggur mær orð í munnin.

"……………..Tá Bill Justinussen landsstýrismaður vildi stramma upp og kunnaði okkara læknar, at hann vildi hava lógina hildna, kenna øll, at eingin úr Tjóðveldisflokkinum kom honum til hjálpar, heldur tvørturímóti. Hugsa bert um orð Tórbjørns á Danatingi. Tobbi, um eg livi og havi heilsuna, tú fært ikki atkvøðu mína aftur…………..". Endurtøka úr leygardagsdimmuni.

Eg krevji av sannleikavitninum Imma Dam, at hann sigur mær og øllum Føroya fólki hvat og nær undirritaði hevur tosað um fría fosturtøku á Danatingi?

Alt tað sum sagt verður á Fólkatingi verður niðurskrivað og lagt út á heimasíðu tingsins. Ynskir Immi at eftirkanna síni ósannindi, so vænti eg, at hann vendir aftur, tá ið hann hevur staðfest, at undirritaði ikki hevur nevnt fosturtøku við einum orði í danska parlamentinum, tíansheldur á Føroya løgtingi.

Tað ber til at vera ímóti fríari fosturtøku uttan at misnýta málið í politiskari spekulatión. Hetta er mín støða. Og hon broytist ikki, líkamikið hvussu harður ágangurin verður.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tá ið kirkjuliðið liggur lík

**John S. Myllhamar**

Í onkrari av fólksins mongu »bíblium« standa tvey vælkent ørindi, ørindi, sum ein fjøld dugir betur enn Faðirvár, og, sum brúkt vera sum skjøldur, at verja seg við, ugga seg við, og at byggja sína ævigu sælu á:

*Betur er at standa á*
*markini og hugsa um*
*kirkjuna,*

*enn at sita í kirkjuni og*
*hugsa um markina.*

Hitt ljóðar:

*Tú undrast, at eg ei sat í*
*kirkjuni og bíndi,*

*meðan sólin í várgleði*
*fjøllunum kíndi;*

*kennir tú meg rætt, so*
*veitst tú væl at eg*

*má leita mær burtur hagar,*
*himinin er høgur,*

*hagar, lotið og fuglurin eitt*
*várkvæði kvøður;*

*tí er hagin nógv betrið enn*
*kirkjan fyri meg.*

o.s.f. o.s.f..

Góð herklæði at brynja seg við til bardaga móti tí, sum vágar at koma við einari áminning um skyldu okkara sum doypt menniskju at møta upp í Guðs húsi. Men hetta er rein undanførsla. Markina, fjøllini, hagan, lotið, fuglin hevur tú allar hinar dagarnar og tímarnar í vikuni.

Harvið vil tú eisini ráða øðrum frá at koma í kirkju. Men sjálvandi hevur tú ikki skyldina at so tómligt er í kirkjuni, tað skyldast hinum: Prestarnir eru ov linir, kirkjutænararnir ov stívir, meinigheitsráðið ov deyðligt, formarnir ov trongir, sangirnir ov tungir. Harvið hevur tú sagt, at í kirkjuni er einki at koma eftir.

Slættið veg Harrans, gerið beinar leiðir hansara, verður rópt í adventini. Við bara at finnast at, ger tú júst tað øvugta, tú leggur forðingar á vegin fyri øðrum at koma í Guðs hús. Hvussu um tú sjálvur, heldur enn at koma við hundratals umberingum, fór í Guðs hús og vermdi og lýsti upp har? Hvussu, um tú eggjaði øðrum: Komi við í Guðs hús, komi og stimbri, komi og eggi presti og kirkjutænarum til, so at teir fáa dirvið og hug at halda á? Tá ruddar tú vegin og slættar gøtuna fyri øðrum til Guðs hús.

Kirkjuliðið er brúður Krists. Tað skal vera livandi, síggjandi, vakin, og vænta komu brúðgómsins. Fyri tí er advent alt árið. Eitt fólk, sum hevur vent kirkjuni í heimbygd síni bakið, tað hevur latið andaligt lív.

Í einari afrikanskari kirkju, har einaferð var eitt blómandi, trúfast og livandi kirkjulið, vendi bygdarfólkið so við og við kirkjuni bakið. Kirkjan stóð at enda tóm, Kristi brúður var sovnað burtur. Ein dagin lýsti prestur til jarðarferð. Og sum til hvørja jarðarferð eins og her hjá okkum, fór maður av húsi, hóast tey ikki vistu hvør var deyður. Tá ið fólkið hevði stúga allar kirkjubríkarnar, kom prestur berandi kistuna inn eftir kirkjugólvinum, setti hana frammi við kórsgáttina, tók lokið av, og bað síðan kirkjufólkið ganga framvið kistuni at síggja líkið og siga tí hitt seinasta farvæl. Røðin var long, sum í forvitnið vildi síggja hin deyða. Hin deyða fingu tey eisini at síggja, tí á botninum á kistuni lá ein stórtur spegil, og har sóu tey beint í andlitið á líkinum, á sær sjálvum.

Eitt av fornkirkjuliðinum reypar og sigur soleiðis um seg sjálvt: "Eg eri ríkur og havi fingið almikið og havi onga neyð!" Men kirkjunnar Harri svarðar hesum sama kirkjuliðið nakað annað aftur: "Tú veitst ikki, at tú ert vesælur og eymur og fátækur og blindur og nakin!"

Eitt bygdafólk, sum hevur sett seym í kirkjudyrnar og vent heilgidóminum bakið, eitt fólk, ið heldur seg vera nóg væl fyri, eitt fólk, ið er fult av sjálvrættvísi, eitt fólk ið kann klára seg uttan Guð, eitt fólk, sum ikki kennir trong ella hevur stundir at koma í Guðs hús ein til hálvanannan tíma einaferð um vikuna, er ikki eitt ríkt og sterkt fólk, men fátækt og vesælt, líkamikið hvat tað so annars eigur av heimsins góðsi og gulli. Eitt slíkt kirkjulið er bara til, tað livir ikki. Har kann vera sungið, at "kirkjan hon er eitt gamalt hús", men hon er "fallin, um tornini standa".

Í bretsku kolanámunum brúktu teir í gomlum døgum hestar at draga kolvognarnar aftur og fram gjøgnum tær myrku gongdirnar, men hvønn sunnudag vóru teir leiddir upp og út í ljósið. Um tað ikki var gjørt, vildu teir innan heilt stutta tíð gjørst blindir. Soleiðis eisini við einum kirkjuliði.

Men er kirkjan afturlatin tí kirkjuliðið er vorðin blint og deytt, tá er eisini opin marknaður fyri øllum møguligum átrúnaðum at gera innrás. Og kunnu hesir brádliga herseta staðin, so svermarí og andaligur ruðuleiki koma at valda.

# Setið dagsskránna hjá Astrup Hansen undir luppin

**Finnur Helmsdal**



Vit, sum minnast, vit minnast hvussu áltráður Jørgen Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka var eftir at avhøvda Elektron 1993, men vit minnast eisini, at danski stjórin tapti tann dystin. Tá slapp hann ikki at flyta virksemið, sum Elektron dagliga tekur sær av, til Danmarkar. Fáum dáma at tapa, og man Astrup teljast millum teir, sum serliga illa vilja lata sær lynda at vera við undirlutan.

Og tað sær heldur ikki út, sum hevur maðurin givið upp. Hann vil framvegis, og hann ætlar framvegis at senda arbeiðið hjá Elektron út av landinum. Og tað sær út sum leiðslan á Elektron ikki ætlar at forða honum í hesum. Tað sær út sum fær Astrup stuðul frá ávísari politiskari síðu. Tað sær út sum, at teir sum ikki taka undir við ætlanunum ella seta spurnartekin ja, teir fáa sekkin.

Nú skal ein ikki loypa á leistum, tá ein ikki kennir málið fult og helt frá øllum síðum. Men tað sær alt annað líka út, sum sleppur Astrup at gera sum honum lystir við Elektron. Tað sær út sum sleppur hann at niðurgera og til einkis gera føroyska ekspertisu á økinum. Havi frætt um kanningar, ið gjørdar eru av kostnaðarstøðinum hjá Elektron og so donskum fyritøkum. Og at tulkingin av hesum kanningum tykist vera bæði ørkymlandi og ósakligar, donsku fyritøkunum til fyrimunar.

Kann sjálvandi ikki pástanda, at Jørgen Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka og nevndarformaður í Elektron ætlar at oyðileggja og knúsa føroyska ekspertisu, sum er uppbygd á Elektron. Tað kann eg ikki, tí eg havi eingi prógv fyri tí. Men er tað ongin, sum hevur myndugleika og ikki minst dirvi til at seta dagsskránna hjá Jørgen Astrup Hansen undir luppin. Sleppa sambandsmenn og javnaðarmenn at valdinum eftir 20. januar 2004, tá verður valla nakað gjørt við málið.

# Framstig á heilsuøkinum!

**Bill Justinussen**
*Bill.teletech.fo*



Hvat feilar Kristian Magnussen? Í grein í Sosialinum leygardagin sigur hann, at "..hóast vit hava havt stóra búskaparliga framgongd seinastu árini, eru ikki stórvegis ábøtur gjørdar innan almanna- og heilsuøkið og skúlaverkið." Hesum verði eg noyddur at aftur-vísa, tí seinasta árið eru ítøkilig framstig hend.

**Stór framstig í sjúkrahúsverkinum**
Komandi ár letur ein nýggjur sjúkrahúsbygningur upp. Ein íløga fyri uml. 200 mill. kr. við innmati. Eitt stórt framstig fyri føroyska sjúkrahúsverkið, sum kemur at hækka tænastuna til sjúklingin munandi. Og útbyggingin heldur fram, um verandi samgonga heldur fram, við 35 mill. árliga í nógv ár framyvir, so niðurslitnu bygningarnir verða umvældir. Eisini er ætlanin at seta skjøtil á útbygging í Klaksvík í 2005.

**Psykiatri**
Støðan hjá teimum sálarsjúku hevur í mong tíggju ár verið vanærislig. Ongin politiskur vilji hevur verið at lyfta hond frá síðu í hesum máli. Men nú er gongd komin á - vónandi - tí nú eru fyri fyrstu ferð settur peningur av til at fara undir økispsykiatri. Sosialpsykiatriin er eisini undir uppbygging, samstundis sum farið er undr at dagføra lógarverkið.

**Heilsuskipan**
Í fíggjarlógaruppskotinum, sum nú er farið í skrell, eru 5 mill. settar av til eina heilsuskipan fyri alt heilsuverkið. Hetta arbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at komandi ár verður farið undir at seta fyrstu partar av hesi í verk til miklan bata fyri bæði sjúklingin og heilsustarvsfólk umframt politisku skipanina. Fyriliggjandi útgreiningararbeiði, sum í hesum árinum er gjørt, vísir á gongdar leiðir, og vóni eg, at hildið verður fram við hesum arbeiði.

**Útbúgving av læknum**
Fleiri pengar eru settir av til útbúgvingarpartin. Serliga við atliti til kommunulæknatørvin, sum øll vita um er stórur. Hví man ikki fyri fleiri árum síðani hevur sæð skeivu gongdina, er mær ein gáta, men nú eru so ítøkilig stig tikin til at broyta skeivu gongdina. Vónandi verður ringasta trýstið á kommunulæknaøkinum av, tá við koma nakað inn í 2005. Eisini er ein nýggj vaktarskipan á veg, sum skal bøta um stressand vaktarviðurskiftini.

**Skúlalæknaskipan**
Ein nýggj lóg um skúlalækna fyri allar Føroyar er liðug og hevur verið til hoyringar. Verður hendan samtykt, verður hetta til stóran bata fyri hetta økið, sum hevur vanrøkt í nógv ár.

**Sjúkraflutningstænastan**
Støðan við sjúkrabilum er betri enn nakrantíð, nú flestu økir hava nýggjar ella næstan nýggjar sjúkrabilar.

**Ílegugransking**
Lógin um ílegugransking er klár at senda til hoyringar, og verður hendan eitt týðandi framstig fyri alt heilsuøkið, um hon verður samtykt.

**Fólkaheilsupolitikkur**
Her eru ítøkilig stig tikin, sum eg skal nema við í aðrari grein.

Samanumtikið sigur Kristian Magnussen sera ósatt, tá hann sigur, at lítið og onki er hent á heilsuøkinum. Fyri at lesarin ikki skal møðast av einum ov longum lesarabrævi, havi eg ikki kunnað nevnt fleiri økir afturat, sum ábøtur eisini eru framdar á.